Filadelfia
„Himmal á jørð“

# Guds trúfesti undir øllum umstøðum




Nú summarferian nærkast og vit øll fara í feriu, er gott at vita, at vit hava ein faðir í himli, ið ongantíð fer í feriu.

Vit lesa í Sálm. 91:

9 „Tí Tú, Harrin, ert skjól mítt“ (sigur tú). – Hin Hægsta hevur tú gjørt til bústað tín;

10 teg skal einki ilt henda, og eingin plága skal koma tjaldi tínum nær.

11 Tí Hann gevur einglum Sínum boð um at varðveita teg á øllum vegum tínum;

12 teir skulu bera teg á hondum, so tú skalt ongum steini sláa fótin ímóti;

Guðs trúfesti er ikki tengt at, at vit eru á møti, nei Guðs trúfesti er við okkum allastaðni har vit eru. Um vit eru heima, ella um vit fara at ferðast í fremmand lond, er Hansara trúfesti har, so at vit kunnu kenna okkum trygg á øllum okkara leiðum.

Mangan er tað soleiðis, at vit á undurfullan hátt uppliva, hvussu alt lagar seg til tað besta fyri okkum, vit hugsa ikki altíð um, hvussu tað ber til, ella hvussu tað hendi.

Men sum tað stendur í Sálma 91, Hann gevur einglum Sínum boð um at varðveita okkum á øllum vegum okkara. Hetta er stórt, og mangan skilja vit ikki stórleikan í Guds orði, fyrr enn vit uppliva ting á okkara vegi, har vit síggja, at tað, ið hendi einans kundi henda, tí Hann er trúfastur og varðveitir okkum á øllum leiðum okkara.

5. Mósebók 32,11 sigur soleiðis: Sum ørnin vekur reiður sítt og sveimar yvir ungum sínum, soleiðis breiddi Hann út vangir Sínar, tók hann upp og bar hann á flogfjaðrum Sínum.

12 Tað var Harrin eina, ið leiddi hann, eingin fremmandur gudur var við honum.

Um vit øll hugsa um, Guds trúfesti yvir okkara lív, rokni eg við, at tað hevði fylt nógvar bøkur, alt tað vit uppliva við Harranum. Onkuntíð verður alt ikki soleiðis, sum vit høvdu ætlað ella vónað, men Hansara trúfesti verður ongantíð burtur.

Ezekiel 47, 6-9:

6 Tá segði hann við meg: „Hevur tú sæð hetta, menniskjasonur?“ Síðani fór hann við mær, fram við áarbakkanum.

7 Tá ið eg kom aftur, sá eg, at ógvuliga nógv trø stóðu báðumegin á áarbakkanum.

8 Hann segði við meg: „Hetta vatn rennur út í landið fyri eystan og síðani longur – oman á slættlendið – og haðani rennur tað í havið. Og táið tað verður leitt út í havið, verður vatnið har gott.

9 Allir livandi skapningar, ið rørast, allastaðni har dupultáin kemur, skulu liva, og fiskurin skal nørast í stórum; tí táið hetta vatn kemur hagar, verður heilsubót og lív, allastaðni har áin kemur.

Tá eg tók ímóti Jesus sum mínum frelsara, flutti Guds dýrd inn í mítt hjarta. Allastaðni har eg fari, eisini um eg einki kenni, fylgir Guds dýrd við mær.

Eg trúgvi, at tann dýrdin, ið er í okkum trúgvandi, er altíð í okkum – tað er einki inn og út. Tá Guds dýrd er flutt inn í mítt lív, verður hon verandi har.

Vit kunnu uppliva tíðir, har alt virkar turt, men so hoyra vit eitt lítið orð ella ein sang, so er Guds nævera har aftur.

Hesi orð eru góð at hava við okkum, nú feriutíðin er. Hesin Gud, ið gevur einglum Sínum boð um at varðveita okkum, er tann sami í dag.

Hann er okkara Gud, okkara faðir og okkara verja á øllum okkara leiðum, so lat okkum leggja hetta summarið í Hansara hendur.

Hann er við okkum, og Hansara dýrd er í okkum, tá kunnu vit av sonnum gleðast og frøðast.

*Góða summarferiu til tykkum øll.*

# JULI 2024

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mánadagur | 1. | | **Reingerð:** Karin og co. |
| | | Kl. 20.00 | **Bønarskúlin**<br>Ábyrgd/leiðari: Ása |
| Mánadagur | 8. | Kl. 20.00 | **Bønarskúlin**<br>Ábyrgd/leiðari: Anna |
| Mánadagur | 15. | Kl. 20.00 | **Bønarskúlin**<br>Ábyrgd/leiðari: Anna-May |
| Mánadagur | 22. | Kl. 20.00 | **Lovprísan og forbøn**<br>Ábyrgd/leiðari: Hildibrandur |

Fyrivarni verður tikið fyri, at broytingar kunnu koma í skránna.

## Samkomudagur í Skóta-húsinum við Løkin



Leygardagin 7. september verður samkomudagur, har vit fara at hugna okkum saman frá morgni til kvølds.

Vit gleða okkum til dagin, har ommur, abbar, foreldur og børn, fara at verða saman ein heilan dag, bara við hugna.

Vit fara at eta saman, spæla saman, dansa og syngja saman og hugna okkum max.

Hesin dagurin er fyri alla familjuna.






*Lita myndina*

Vit lesa um ein lítlan mann,
sum forum einaferð,
sum visti tó hann ríkur var
ei gull tað besta er.

Á ja mín vinur tað er satt,
ei gull tað besta er,
at vita, at mín sál er frelst,
tað mangan betur er.

So klývur hann upp í eitt træ,
sum tætt við vegin var,
at síggja hann, sum meir enn gull
til mannasálir bar.
Á ja mín vinur …

Ein maður kemur gangandi
og steðgar síni ferð,
kom niður sigur hann í dag,
hjá tær mítt tilhald er.
Á ja mín vinur …